

# Góðan túr!

Í fagnaði um Fólkaheilsuætlanina, sum júst er løgd fyri Løgtingið, ynskja Almanna- og heilsumálaráðið og landsstýrismaðurin øllum luttakarum í Tunnilsrenningini 23. apríl í sambandi við at Norðoyatunnilin letur upp og Flaggdagsrenningini í Tórshavn og Suðuroy 25. apríl góðan túr.

Almanna- og heilsumálaráðið

TEAM85




# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Koyrikortdeildina at seta 1. juli 2006. Talan er um fast starv, ið er skipað sum fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**

Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting og framleiðslu av koyrikortum
- Umsiting av tíðum til ástøðis- og koyriroyndir
- Málsviðgerð
- Postavgreiðslu
- Kassauppgerð

**FØRLEIKAKRØV**

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og kundavinaligur. Tað er ein treyt, at viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**SETANARTREYTIR**

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, um Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**

Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara á tlf. 35 04 00 ella 35 04 20. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2006.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, vegskatt og skrásetingargjøld.*

*Umfram høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 19 fólk.*

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

REPROZ



# *Aðalstjóri* til Almanna- og heilsumálaráðið

Við hesum verður søkt eftir aðalstjóra til Almanna- og heilsumálaráðið.

**Starvið**

Aðalstjórin verður ovasti ráðgevi hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum og fer at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Almanna- og heilsumálaráðnum. Økið fevnir um: almannamál, heilsumál og bústaðarmál.

**Høvuðsuppgávur**

- Leiða og samskipa arbeiðið í ráðnum
- Samskipa og fyrireika uppgávur í omanfyrinevndu málum
- Fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan virkisøkið
- Eftirlit við stovnum undir Almanna- og heilsumálaráðnum
- Aðrar viðkomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til

**Almenn førleikakrøv**

Sett verður sum krav, at umsøkjarin hevur útbúgving frá lærdum háskúla og leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving og royndir, ið kunnu javnsetast við hesi. Umráðandi er, at tann, ið verður settur, hevur evni at seta í verk fyriskipanir, hevur góðar leiðslueginleikar, innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting. Dentur verður lagdur á persónligar eginleikar so sum evni at eggja og menna leiðarar og starvsfólk, góð samstarvsevni, vilja til at royna nýggj virkisøki og áhuga í avbjóðingum.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tænastumannastarv, starvsheitið er aðalstjóri og er flokkað í 39. lønarflokki. Harumframt er ein mánaðarlig viðbót sum er 4.375, 28 kr.

Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Setanarøkið fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin í løtuni er Almanna- og heilsumálaráðið.

**Nærri upplýsingar**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, tel 35 10 10.

**Umsókn**

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu stílast til løgmann, og sendast Løgmansskrivstovuni, Marjuni Hanusardóttur, løgmansstjóra, postsmoga 64, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 15. mai 2006. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Miðfyrisitingin veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Fremst í nýskapan, arbeiðslagi og samskifti.*

LØGMANSSKRIVSTOVAN

>> Vit draga eina línu >> Vit seta skynsemi í hásæti >> Vit vilja vita >> Vit bróta slóð

KREA.FO · TEL 47 80 80